# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*– Tað stutta av tí langa er, at tað ber ikki til hjá okkum at spæla móti luksemburg í juni mánaði*

*Magnus á Stongum, formaður í landsliðsnevndini hjá FSF*

# Estland fyri Luksemburg

**Ætlaði landsdysturin móti Luksemburg verður av ongum. Ístaðin roynir Fótbóltsambandið at fáa í lag venjingardyst móti Estlandi**


*Talan verður ikki um dyst móti Luksemburg, sum Føroyar annars tríggjar ferðir hava vunnið ímóti. Ístaðin verður arbeitt við at fáa Estland henda vegin í juni mánaði*
*Mynd: Morgunblaðið*

**FÓTBÓLTUR**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Ísland og Luksemburg. Tað vóru uppgávurnar, sum FSF hevði fingið á tapetið, tá farið varð undir fyrireikingarnar til landsliðsárið 2008.

Ikki minst hóvaði tað føroyingum væl, at talan gjørdist um dyst móti Luksemburg, sum vit áður hava bast tríggjar ferðir. Hetta var ein dystur, sum við hepni kundi geva Føroyum nøkur tiltrongd stig á FIFA-styrkislistanum. Men nú er so greitt, at tað verður ikki frá Luksemburg, at tey stigini skulu koma.

- Har kom tíverri eitt avboð frá Luksemburg. Akkurát, hvør orsøkin til hetta var, veit eg ikki. Men tað stutta av tí langa er, at tað ber ikki til hjá okkum at spæla móti luksemburg í juni mánaði, sigur Magnus á Stongum, sum er formaður í landsliðsnevndini hjá FSF.

- Men ætlanin er so, at vit skulu hava ein venjingardyst í juni kortini. Í løtuni verður samráðst við Estland, og tann dysturin er næstan komin undir land, sigur Magnus.

Føroyar hava fýra ferðir áður spælt móti Estlandi. 24. februar í 1996 spældu Føroyar 2-2 javnleik í venjingardysti. 6. august í 1997 vunnu okkara menn 2-0 á útivølli – eisini í venjingardysti.

Verri gekst tó, tá vit árið eftir komu í undankappingarbólk við Estlandi. Tann 4. juni í 1998 fingu okkara menn av at vita í 5-0 tapi í Tallinn, og tann 4. september árið eftir vann Estland 2-0 á Føroyum á Tórsvølli.

# Eingin hevur fulla úrtøku

**Ólavur Simonsen megnaði við svørtum remis ímóti Helga Dam Ziska, og saman við teimum báðum hava eisini Carl Eli N. Samuelsen og Torkil Nielsen 1,5 stig**

**TALV**
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Eftir tvey umfør í FM í talvi hevur eingin fingið fult.

Í 2. umfari megnaði Ólavur Simonsen við svørtum remis ímóti Helga Dam Ziska. Helgi hevði vunnið við svørtum ímóti Herlufi Hansen.

Veteranurin Torkil Nielsen er millum teir fremstu. Í dag vann hann við hvítum á Hans K. Simonsen. Torkil megnaði í gjár við svørtum remis ímóti Martini Poulsen. Martin var aftur sunnudagin partur av remis. Hesa ferð var tað ímóti Carl Eli N. Samuelsen, sum higartil hevur staðið seg væl.

Leygardagin taptu bæði Olaf Berg og Herluf Hansen. Í gjár telvaðu teir remis.

Rani Nolsøe er ikki enn komin á stigatalvuna. Sunnudagin tapti hann við hvítum ímóti Finnbirni Vang.

Helgi Dam Ziska, sum var hægst styrkismetti telvarin í kappingini, hevði forfall leygardagin, og tí varð dysturin hjá honum móti Herlufi Hansen útsettur.

### 1. umfar

| | |
|---|---|
| Martin Poulsen 2303 – Torkil Nilesen 2058 | 0,5-0,5 |
| Carl Eli Nolsøe Samuelsen 2231 – Olaf Berg 2183 | 1-0 |
| Herluf Hansen – IM Helgi Dam Ziska | |
| Ólavur Simonsen 2092 – Rani Nolsøe 2036 | 1-0 |
| Finnbjørn Vang 2081 – Hans Kristian Simonsen 2178 | 0-1 |

### 2. umfar

| | |
|---|---|
| Torkil Nielsen 2058 – Hans K. Simonsen 2178 | 1-0 |
| Rani Nolsøe 2036 – Finnbjørn Vang 2081 | 0-1 |
| IM Helgi Dam Ziska 2400 – Ólavur Simonsen 2092 | 0,5-0,5 |
| Olaf Berg 2183 – Herluf Hansen 2023 | 0,5-0,5 |
| Martin Poulsen 2303 – Carl Eli N. Samuelsen 2231 | 0,5-0,5 |

### Støðan eftir tvey umfør

| | |
|---|---|
| IM Helgi Dam Ziska, Carl Eli Nolsøe Samuelsen, Torkil Nielsen, Ólavur Simonsen | 1,5 stig |
| Martin Poulsen, Hans Kristian Simonsen, Finnbjørn Vang | 1,0 stig |
| Olaf Berg, Herluf Hansen | 0,5 stig |
| Rani Nolsøe | 0 stig |

Mánadagin
Kl. 10
Torkil Nielsen – Rani Nollsøe
Helgi Dam Ziska – Hans K. Simonsen
Olaf Berg – Finnbjørn Vang
Martin Poulsen - Ólavur Simonsen
Carl Eli N. Samuelsen – Herluf Hansen

Kl. 14
Herluf Hansen – Torkil Nielsen
Ólavur Simonsen - Carl Eli N. Samuelsen
Finnbjørn Vang - Martin Poulsen
Hans K. Simonsen - Olaf Berg
Rani Nolsøe – Helgi Dam Ziska

